Viðtøkur fyri Suðuroyar sjónleikarafelag

§ 1

Navn felagsins er Suðuroyar sjónleikarafelag. Felagið er stovnað 2. november 2017 og felagið er heimahoyrandi í SALT í Øravíkarlíð.

§ 2 Endamál felagsins

Endamál felagsins, er at savnast um sjónleik, at menna sjónleikarakynstrið og at sígga til, at sjónleikaraframførslur verða settar á skrá. Limirnir í Suðuroyar sjónleikarafelag leggja stóran dent á, at felagið umboðar alla oynna.

§ 3 Nevnd & limir

Suðuroyar sjónleikarafelag hevur eina 3 mannanevnd við tveimum tiltakslimum. Nevndin skipar seg sjálv við formanni, skrivara og kassameistara. Nevndarlimirnir sita í 2 ár og kunnu veljast aftur, annaðhvørt ár 1 (líka ár) og annaðhvørt ár 2 limir (ólíka ár). Tiltakslimir verða valdir fyri eitt ár. SALT hevur observatiónsstatus á nevndarfundum.

Nevndarlimur kann til eina og hvørja tíð leggja frá sær. Tiltakslimur tekur við, um nevndarlimur leggur frá sær í úrtíð.

Nevndin er viðtøkufør, táið í minsta lagi 2 nevndarlimir eru møttir á fundi, og formaðurin skal vera ein teirra.

Limur í felagnum kann gerast hvør tann, sum hevur áhuga fyri felagsarbeiðnum og tekur undir við endamálsgreinini og lógum felagsins. Limagjaldið verður ásett á aðalfundinum eftir tilmæli frá nevndini.
Limafundur verður hildin, tá ið nevndin ella tíggju limir biða um tað, og annars tá tørvur er.

Atkvøðurætt hava allir limir, sum hava fylt 16 ár og hava goldið limagjald. Limur skal vera fyltur 18 ár fyri at verða valdur í nevnd.

§ 4 Aðalfundur

Aðalfundur hevur hægsta ræði í øllum felagsmálum og verður hildin hvørt ár í mars mánaða. Boða verður til aðalfund 4 vikur frammanundan. Formaðurin leggur fram ársfrágreiðing og kassameistarin leggur fram grannskoðan roknskap til góðkenningar. Roknskaparárið er kalendaraárið. Uppskot til innkomin mál skulu vera nevndini í hendi 7 dagar fyri aðalfund.

Aðalfundurin velur nevndarlimir og tiltakslimir sambært §3.
Skrá á aðalfundi:

1. Val av fundarstjóra (skrivarin heldur fram til eftir aðalfundin)
2. Formaðurin/-kvinnan leggur fram ársfrágreiðing
3. Kassameistarin leggur fram granskoðan roknskap
4. Val av nevndarlimum
5. Val av tiltakslimum
6. Val av ríkisviðurkendum grannskoðara
7. Áseting av limagjaldi
8. Innkomin mál
9. Ymiskt

§ 5 Viðtøkubroytingar

Viðtøkur kunnu broytast, um í minsta lagi tveir triðingar av limunum á aðalfundi atkvøða fyri broytingum.

§ 6 Avtøka av felagnum

Um felagið Suðuroyar sjónleikarafelag verður niðurlagt, skulu møgulig virði í felagnum ognast SALT.

Samtykt á stovnadi fundi 2. november 2017